## Grótkastið í Skálavík verður nú umvælt

Á bygdaráðsfundi fyrr í vikuni samtykti bygdarráðið í Skálavík at taka av tilboðnum frá R.T.S. Contractors um at umvæla grótkastið, sum fór í herviligu vetraródnini herfyri. Harumframt skal nýtt grótkast gerast út á Magnusartanga, og verður hetta einar 9 metrar langt. Sjálvur bátahylurin skal eisini dýpast eins og onnur arbeiðir skulu gerast, skrivar bkv.fo. Alt arbeiðið kemur at kosta umleið 3,5 mió krónur.



## Sandoyingar bjóða til stevnu í Húsavík

Eins og aðrar bygdir kring landið, skipa fólkið í Sandoynni eisini fyri sínari stevnu, teirri sonevndu Sandoyarstevnuni. Í ár verður henda stevnan hildin í Húsavík í døgunum 11. til 13. juli. Fyrireikarar vóna, at tað koma nógv fólk til Húsavíkar. Longu nú er greitt, at klovnar fara at undirhalda børnunum. Fríðbjørg Jensen fer at syngja, umframt Martin Joensen úr Vestmanna og aðrir vísusangarar. Møti og dansur verða eisini.

# Skeiðsdepil skapar samveru í Skálavík

**Seinnapartin í gjár varð fyrsti hakin settur í eina av teimum heilt stóru og forvitnisligu verkætlanunum í Føroyum, nevniliga ein nýggjan skeiðsdepil í Skálavík, ið fyrrverandi reiðarin, Eiler Jacobsen stendur aftanfyri**

BYGDAMENNING
*Orð&myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Skálavík:** Tað var Eiler Jacobsen sjálvur sum loysti fyrsta bøkkin til henda depilin, ið fyrst og fremst skal vera karmur fyri kristiligum møtum og legum.

Ætlanin er síðan at depilin skal gerast til ein part av føroysku ferðavinnuni og øðrum virksemi, sum verður avleitt av hesum.

Tríatitals milliónir verða nú settar í henda frítíðar- og mentanardepilin, sum tað væntandi fer at ganga tvey ár at byggja. Depilin, sum verður út ímóti 4000 fermetrum til støddar, og liggur á einum 50.000 fermetrar stórum grundøki.



*Eiler Jacobsen hevur júst loyst fyrsta flagið til stóra frítíðardepilin, sum væntandi kann verða liðugur um eini tvey ár. Borgarstjórin í Skálavík, Linjohn Christiansen fegnast um ætlanina í hansara kommunu*



*Skeiðsdepilin hevur útlendskan dám, og verður vónað, at útlendingar eisini fara at gera brúk av deplinum til ráðstevnur, skeið og annað*

Verkætlanin fevnir um eitt nú svimjihyl, tónleika- og møtisal, baðiland og matstovu, umframt gistingarmøguleikar.

Borgarstjórin í Skálavík, Linjohn Christiansen fegnast um hesa ætlanina í hansara kommunu. Eftir hansara meting verður her ein møguleiki at kunna hýsa størri altjóða ráðstevnum í Føroyum.

- Vónandi fara eisini útlendsk ferðalið og áhugabólkar at koma til Skálavíkar at halda skeið og størri ráðstevnur. Hetta fer uttan iva at skapa lív í bygdini og í oynni, sigur Linjohn Christiansen.

Meiri um hesa stóru ætlanina í einum komandi blaði!

## Sleppa ikki undan oljutunnum beinanvegin

**Løgmálaráðið hevur ætlað og ætlar framvegis, at tað skal gerast einfaldari hjá fólki á útoyggj at fáa olju í land. Oljutunnurnar skulu hereftir fara í søguna**

BYGDAMENNING
*Snorri Brend*

Í eina tíð hava samráðingar verið millum kommunur á útoyggjum, SEV, oljufeløgini og Fiskimálaráðið um møguleikarnar at bøta um oljuflutningin til útoyggjar okkara.

Í september mánaði í fjør var málið komið so langt, at ein eykajáttanarlóg varð løgd fyri tingið, har ein sløk millión krónur skuldi setast av til hetta endamálið.

Við hesi upphæddini var ætlanin at keypa ein mobila oljupumpu at fáa oljuna frá skipunum hjá Vaktar- & Bjargingartænastuni og upp í tangar á landi. Her skuldi ein so keypa eina mobila pumpueind at føra oljuna frá tangunum til húsarhaldini.

Eins og so mong onnur uppskot datt hetta eisini niðurfyri, tá løgtingsval varð útskrivað í desember mánaði í fjør. Og á fíggjarlógini fyri 2008 er eingin upphædd sett til hetta endamálið.

Men sum skilst á Hilmari Høgenni, deildarstjóra í Løgmálaráðnum er hetta eitt mál sum verður raðfesthøgt í fíggjarlógini fyri komandi ár.

Sosialurin hevur áður skrivað um hesa skipanina sum stendur púra klár í Mykinesi. Her er alt klárt at taka ímóti oljuni, men enn verður bíðað eftir at fáa oljuna pumpaða í land.

Líkt er til, at tað kann fara at henda komandi ár.